Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjørt Samuelsen, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

Evni: Sensurur í mun til stuðul til filmsverkætlanir hjá ungum listafólki

Spurningar:

1. Er løgmaður, ið hevur eftirlit við landsstýrisfólkunum, nøgdur við háttin, landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum umsitur játtanina til filmsframleiðslu, nú hann enn einaferð setur faklig tilmæli til viks og noktar ávísum ungum listafólki stuðul, tí verkið hóvar landsstýrismanninum illa?
2. Metir løgmaður hetta vera í samsvari við góðan fyrisitingarsið og at umsita játtanina til film á fullgóðan hátt, tá ung evnarík listafólk ikki fáa stuðul, orsakað av, at landsstýrismanninum persónliga ikki dámar innihaldið?
3. Heldur løgmaður tað vera sakligar grundgevingar, sum góð fyrisiting krevur, at til dømis seksuelt innihald ella banniorð eru grundgevingar fyri at nokta ungum filmsspírum stuðul úr filmsgrunninum?

Viðmerkingar:
Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum hevur enn einaferð kolldømt eitt fakligt tilmæli um fíggjarligan stuðul til ungt filmslistafólk. Løgmaður hevur eftirlit við, at hvør einstakur landsstýrismaður situr fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt.
Spurt verður tí løgmann, um hann metir, at mátin landsstýrismaðurin í mentamálum umsitur stuðulsjáttanina til filmsgerð er í samsvari við góðan fyrisitingarsið og um løgmaður í hesum heldur, at landsstýrismaðurin umsitur hetta økið á fullgóðan hátt.
Føroysk filmsvinna og filmsframleiðsla hava ment seg sera nógv seinastu árini. Millum ungu talentini telist eisini Katrin Joensen-Næs, sum sambært tilmælinum átti at fáa 75 túsund krónur til filmin, sum viðger evnið sex. Har sita væl skikkað fólk og tilmæla. Fólk, sum eru før fyri at meta um, hvørt verkætlanin er dygdargóð og innihaldið borðbært. Hóast grundgevingarnar frá ráðgevingini hjá landsstýrismanninum fyri at lata stuðul eru, at talan er um verkætlan á fakliga høgum støði, so noktar landsstýrismaðurin stuðul úr filmsjáttanini, sonevnda filmsgrunninum. Síðan 2014 hevur serstøk játtan til film verið undir Mentamálaráðnum, og stuðulstørvurin er fleirfalt tað, sum pengarnir strekkja til. Stuðul úr filmsgrunni ella frá almennari stuðulsskipan, har stuðul verður givin eftir fakliga ásettum treytum, er aloftast ein fyritreyt fyri at fáa fígging aðrastaðni frá. Tí er tað at nokta fyri stuðli eisini eitt slag, sum kann fáa størri avleiðing enn null krónur av játtanini, sum Jenis av Rana umsitur - vegna Løgtingið, og harvið vegna Føroya fólk.

Á Løgtingi, 28. mai 2021

Bjørt Samuelsen